# DRUKKIN SLE



## Festivalgestir fara vanliga í svimjihøllina at vaska sær. Men um tú er ov drukkin, so fært tú ikki atgongd

Uni Holm Johannesen
Myndir: Jens Kristian Vang

Reglugerðin vísir tað greitt og einfalt.

– Tað er strangliga bannað at vera ávirkaður av rúsevni í svimjihøllini, stendur við stórum og svørtum bókstavum.

Svimjihøllin í Klaksvík hevur vanliga eina rúgvu av gestum, meðan Summarfestivalurin er.

Torkil Mørkøre rekur svimjihøllina. Hann vísir á, at gestirnir skikka sær vanliga væl, hóast tey hava drukkið. Men tað er eitt greitt mark, hvat starvsfólkini meta er sømiligt og ikki.

Starvsfólkið snakkar við gestirnar, áðrenn tey fara í skiftingarklivan og meta síðan, um einstaki gesturin er førur fyri at svimja.

– Spurningurin er, hvar markið er. Vit vilja ikki vera ótespilig og øsa fólk. Vit seta ein ellar tveir spurningar um teirra dagar á festivalinum, og síðan gera vit av, um tey fáa atgongd, sigur Torkil Mørkøre.

Svimjihøllin syrgir fyri, at tað eru tryggir karmar, meðan Summarfestivalurin er. Tí eru fleiri starvsfólk til arbeiðis, enn vanligt er.

### Onkrar hendingar

Tað eru einstakar hendingar, har starvsfólkini hava verið noydd at tveitt ávirkaðar gestir út.

Annars hevur riggað væl í svimjihøllini.

Torkil Mørkøre staðfestir, at tað er larmur í høllini hesar dagarnar. Gestirnir seta sín greiða dám á við sangi og ýli.

– Tað vísir seg, at tilkomin fólk halda seg burtur hesar dagarnar. Tað er torført at verja seg fyri larminum. Hinvegin, so frøir tað okkum, at gestirnir hugna sær, greiðir Torkil Mørkøre frá.

Tað er serliga skreiðibreytin í høllini, sum er væl umtókt. Tað er skjótt, at tað gongur ov hart fyri seg á breytini. Tá fáa gestirnir eina friðarliga átalu, og so er knúturin loystur.

### Stórar ætlarnir

Torkil Mørkøre leggur afturat, at svimjihøllin ætlar at hava meira forkunnug tilboð til festivalgestirnar um nøkur ár.

Ætlanin er at leggja ymiskt afturat baðilandinum, og kanska verða ymsar útbyggingar framdar.

Hann dugir ikki reiðiliga at siga júst nú, hvussu tað fer at síggja út.

Men svimjihøllin vil í øllum førum hava serlig tilboð til gestirnar í framtíðini.